# Fríðkanardagur





**8. juni 2006**

## Í øllum bygdum

Sum kunnugt er økið stórt og nógv er at taka upp eftir ein langan og harðan vetur. Tí heitir Runavíkar kommuna á allar borgarar í øllum bygdum í Kommununi um at rætta eina hjálpandi hond við ruddingini.

## Tíð og stað

Møtt verður kl. 17.30 hósdagin 8. juni á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Missiónshúsið í Æðuvík: | Æðuvík |
| Rituvíkar skúli: | Rituvík |
| Fimleikahølin í Glyvra skúla: | Runavík, Saltangará, Glyvrar, Lamba og Lambareiði |
| Søldarfjarðar skúli: | Søldarfjørður og Skipanes |
| Ítróttarhøllin á Skála: | Skála og Skálafjørður |
| Oyndarfjarðar skúli: | Oyndarfjørður |
| Funningsfjarðar skúli: | Elduvík og Funningsfjørður |

## Samskipan

Hvør borgari ruddar í økinum, har tey búgva. Ein samskipari verður á hvørjum øki.

## Burturkast

Fólk verða biðin um at koyra burturkastið í posar og seta teir fram við vegnum. Hesir verða heintaðir.

## Plantupakki og Suppa

Eftir Fríðkanardagin bjóðar Runavíkar kommuna suppu kl. 21.00 á hesum støðum:

Fimleikahøllin í Glyvra skúla:
Æðuvík, Rituvík, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Lamba, Lambareiði, Søldarfjørður og Skipanes.

Ítróttarhøllin á Skála:
Skála og Skálafjørður

Oyndarfjarðar skúli:
Oyndarfjørður

Funningsfjarðar skúli:
Elduvík og Funningsfjørður

Á hesum støðum fær hvørt húsarhald eisini ein plantupakka útflýggjaðan frá Kommununi.

## Møtið fjølment

Umframt at náttúran verður fríðkað, er hesin dagur eisini eitt gott høvi at møta sínum grannum og vera saman um eitt felagsátak.

Runavíkar kommuna